## Tiltøk á Klaksvíkar bókasavni

Nú heystið so smátt er komið, fer Klaksvíkar bókasavn aftur at skipa fyri tiltøkum fyri børnum í skúlaaldri. Fyrsta tiltakið verður mikudagin 19 oktober kl. 17.00. Tá verður møguleiki hjá børnunum at koma á bókasavnið at telva. Fólk úr Klaksvíkar Talvfelag vera til staðar at vegleiða børnunum.

Síðani verður eitt tiltak um mánaðin fram til páskir. Nógv ymiskt verður á skránni, og skrá yvir tiltøkini fæst á bókasavninum.

Saman við barnaansingarstovnunum hevur bókasavnið í fleiri ár skipað fyri tiltøkum fyri børn undir skúlaaldur. Hesi tiltøk eru fríggjamorgnar kl. 10.30. Næsta tiltak verður 14. oktober fyri tey 0 - 3 ára gomlu og verður tað Dr. Margrethes Barnagarður, ið stendur fyri. Skrá yvir hesi tiltøk fæst eisini á bókasavninum.

Ætlanin er eisini at skipa fyri ymiskum fyri vaksin í heyst. Vit byrja við einum eldrakvøldi týskvøldið 25 apríl, tá fer Erling Poulsen at siga frá bókum sínum "Mangt er millum himmal og jørð" og "Meiri er millum himmal og jørð".

**ave**

## 12 størv færri á Heimarøkini

**Trý nýggj røktarheim lata upp næsta hálva árið, og tað ber við sær sparingar innan Heimarøktina**

ELDRARØKT

*Jákup Mørk*

Hesum boðaði Heimarøktin og Serforsorgin frá í tíðindaskrivi til miðlarnar mikudagin.

Sagt verður, at umskipanir innan eldraøkið hava við sær, at tað næsta ár verða 12 fulltíðarstørv færri innan Heimarøktina. Hetta svara til eini 15-18 starvsfólk, og hava hesi nú fingið ætlanarskriv um uppsøgn.

Tað er tó ikki so, at eldraøkið verður skert. Komandi hálva árið lata trý nýggj røktarheim upp. Hesi eru á Streymnesi, í Runavík og í Havn, og íalt geva hesi 72 nýggj røktarheimspláss, sum fara at krevja á leið 60 nýggj fulltíðarstørv.

Samstundis sum nýggju røktarheimini verða tikin í nýtslu, væntast trýstið á Heimarøktina úti í heimunum at minka nakað. Av hesi orsøk er í fíggjarlógaruppskotinum 2006 framd ein umskipan av játtanini innan eldraøkið frá Heimarøktini til røktarheimsøkið. Hetta kemur at viðføra broytingar í Heimarøktini, tí samstundis sum fleiri nýggj arbeiðspláss verða skipað á nýggju røktarheimunum, hvørva nøkur arbeiðspláss í heimarøktina úti í heimunum.

Hetta merkir, at játtanin til røktarheim økist við 23 mió kr. Játtanin til Heimarøktina minkar samstundis við 4 mió kr.

## Útselt til DR Big Band og Eivør

Atgongumerkini til fyrru konsertina hjá Danmarks Radio Big Band og Eivør Pállsdóttir vóru útseld mikudagin. Konsertin var í Læraraskúlahøllini kl. 20.00 hóskvøldið. Enn eru tó atgongumerki eftir til konsertina í Fuglafirði fríggjakvøldið kl. 20.00.

Big Bandið, sum telur 20 tónleikarar og 5 onnur var á rættari ævintýrferð í sjáldsama góðveðrinum mikudagin fyrst undir Vestmannabjørgunum við Skúvadal og síðan tyrlutúr við Atlantic, sigur fyriskiparin G! Music í tíðindaskrivi.

Konsertirnar eru partur av eini tónleika rundferð, sum Big Bandið og Eivør eru á. Í vikuskiftinum spældu tey í Haderslev og Arne List, ið var hjástaddur, sigur við Planet.fo, at konsertin var ordiliga góð. Tað er sambært Arna sera stórur munur á Trøllabundin á fløgu og í livandi líki. Heili tvær ferðir mitt undir konsertini róptu fólk um at hoyra eykaløg, og tá Eivør og hini fór av pallinum, reistu fólk seg og lógvabrestirnir ljómaðu leingi.

Arne sigur, at Nikolai Bentzon sum er dirigentur og frásøgumaður, greiddi frá um hvussu glað og errin tey eru í DR Big Band at arbeiða saman við Eivør.

Á konsertini sang Eivør løgini á Trøllabundin og ein kingosálm. Henda gøtudanska framførsla vann serligan ans millum áskoðararnar, ið sambært Arna elskaðu tað.

**nud**

# Singer/songwriter 2005


*Opor Thorleifsson*


*Petur Háberg Jacobsen*


*Guðrið Hansen*


*Brandur Karlson Jacobsen*

**Leygarkvøldið byrjar kappingina um at gerast besti singer/songwriter tónleikarin í Føroyum. Kappingin verður í ár fyriskipað á triðja sinni, og áhugin hevur ongantíð verið størri**

SANGKAPPING

Vinnararnir ávíkavíst í 2003 og 2004, Kristleif Zachariasen og Rókur Jacobsen, hava vunnið nógv fram millum føroyingar, síðani teir vunnu hvør sína singer/songwriter kapping.

Ikki minst teir góðu vinningarnir gera, at áhugin ár um ár hevur verið góður. Vinnarin fær nevniliga upptøkudagar í einum vælútgjørdum studio. Serliga fyri Kristleif Zachariasen gjørdist hetta ein rættiligur fongur, tá hann fór undir at spæla sína egnu fløgu inn.

Leygarkvøldið verður fyrsta ábendingin um, hvør í ár sleppur at royna seg í einum góðum upptøkuhøli. Luttakararnir skulu spæla tvey egið løg og síðani eitt lag eftir egnum vali. Royndir dómarar gera av, hvør vinnur kappingina.

### Royndir tónleikarar

Hóast singer/songwriter navnið ikki er serliga føroyskt, so verða tað fýra ógvuliga spentir og ógvuliga ymiskir føroyskir luttakarar við leygarkvøldið.

Hóast hann hevur givið tveir fløgur út, so hevur elsti luttakarin leygarkvøldið, Petur Háberg Jacobsen, ongantíð staðið á palli einsamallur áður. Tónleikaáhugaði reiðarin er ikki mettaður av tónleiki enn og hevur hug at royna seg fullkomiliga einsamallan, sum er eitt av eyðkennunum við singer/songwriter stílinum.

Við sínum tretivu árum er Brandur Karlson Jacobsen fimm ár yngri enn Petur Háberg Jacobsen.

Fleiri kennast óivað við navnið, og tað er ikki uttan orsøk. Vit kunnu fara heilt aftur til 1991 fyri at finna hann sum vinnari av Àrsins songrødd kappingini. Hann hevur eisini verið at hoyrt í øðrum sambondum, men tey seinnu árini hevur hann ikki verið so nógv frammi alment sum tónleikari. Nógv er broytt síðani 1991, og tað verður spennandi at síggja, hvussu singer/songwriter stílurin og Brandur rigga saman.

### Av kendum ættum

25 ára gamla Guðrið Hansen er einasta kvinnan í hesum fyrsta umfarinum. Hon er ikki tann einasta frá Hansen familjuni, sum verður umboðað í kappingini í ár. Eisini beiggi hennara, Fróði, fer í einum seinna umfari at luttaka.

Guðrið hevur verið at sæð á palli í Føroyum í ymsum høpum. Millum annað hevur hon sungið kór í Prix Føroyum. Hon hevur eisini luttikið í íslendsku útgávuni av Idol, har hon stóð seg rættiliga væl. Hon ætlar sær nú at fara at gera meira við tónleikin, og hon sær hetta sum eitt óført høvi at sleppa nærri nøkrum góðum upptøkumøguleikum.

Yngsti luttakarin leygarkvøldið verður Opor Thorleifsson. Hóast bert tjúgu ár hevur landarin av Skála spælt eitt sindur fyri fólki í Føroyum og í Danmark. Hann kundi gott hugsað sær, at tað gjørdist til meira, og tí hevur hann eisini meldað seg til singer/songwriter 2005. Hann verður fyrstur á pallinum, tá Singer/songwriter 2005 fer av bakkastokki leygarkvøldið kl.22.00 í Hafnia Lounge.

# Árliga sjónleikarastevnan verður í Klaksvík

**Í vikuskiftinum 4.-6. november 2005 skipar MáF - Meginfelag áhugaleikara Føroya - saman við Klaksvíkar Sjónleikarafelag fyri árligu sjónleikarastevnuni, sum í ár verður í Klaksvík**

SJÓNLEIKARASTEVNA


*Frá sjónleikarastevnuni á Giljanesi*

Endamálið við stevnuni er at savna sjónleikarafólk úr øllum landinum saman at umrøða sjónleik, arbeiða við sjónleiki, hugna sær saman, og hæddarpunktið er ein megnar veitsla.

Í ár verður ljóskastarin settur á færoysku kvæðini.

Ber til at flyta dramatisku søgurnar í kvæðunum úr dansistovuni og upp á pallin?

Árni Dahl fer út frá Sjúrðarkvæðunum at leiða luttakararnar inn í kvæðaheimin, og Eyð Matras, Mikkjal Helmsdal og Birita Mohr fara síðani saman við luttakarunum at skapa sjónleik burtur úr spennandi søgunum í Sjúrðarkvæðunum.

Alt tiltakið verður í skótahúsinum, har møguleikarnir eru góðir at arbeiða, eta og sova og fara upp á gólv, um onkur far hug til tað.

Sjónleikarastevnan er fyri ung sum eldri, roynd sum minni roynd, og væntar MáF góða luttøku úr øllum landinum, siga tey úr MáF. Meira fæst annars at vita á telefon 315624.